DAGSINS MEINING

Varandi orka og vantandi orkupolitikkur

Vit brúka aftur meiri orku. Hákonjunktururin, vit ríða á, hevur slept øllum sparihuga. Harafturat krevja vinnuligar útbyggingar, t.d. stór frystivirki, meiri el-orku. Tí hevur SEV verið noytt at gera íløgur í tveir nýggjar motorar og ein skal keypast afturat. Harafturat hevur el-felagið hjá føroysku kommununum sett upp nakrar møguleikar fyri, hvar og hvussu vatnorkan kann byggjast út.

Men áðrenn nakað orðaskifti hevur tikið seg upp um tær nýggju og gomlu ætlaninar at byggja út vatnorkuna í Norðurstreymoy, Eysturoynni og í Suðuroynni, hevur Kári Thomsen, arkitektur, kastað eitt uppskot um at seta upp fleiri vindmyllur út í tað vantandi orkupolitiska orðaskiftið í Føroyum.

Útvarpið viðgjørdi frágreiðingina hjá Kára Thomsen, formanni í FNU, í Føroyum í dag í síðstu viku. Breddin í Sjónvarpinum mánakvøldið setti orku-ætlaninar hjá SEV og Kára í eitt rættiliga gott og áhugavert perspektiv. Fyri og ímóti. Og harafturat fingu vit at vita, at SEV arbeiðir við nýggjum uppskoti um eina vatnorkuætlan í Vágum.

Hesar ætlanir eiga at elva til eitt orkupolitiskt orðaskifti í Føroyum. Vit eiga at ansa eftir, at vit ikki aftur enda í skotgravunum sum fyri 20 árum síðani. Tað hendi, tá SEV í 1978 samtykti í prinsippinum at byggja út vatnorku við Fjallavatn í Vágum, Eiðisvatn í Eysturoynni, Norðuri í Dølum og í Saksunadali í Norðurstreymoy. Uttan at vilja upplýsa fjølmiðlum – almenninginum – um ætlaninar.

Í prinsippinum eiga vit at leggja áherðslu á tær varandi orkukeldurnar, sum eru vatn, vindur, sól, streymur og alduorka. Men teir báðir síðstu møguleikarnir eru enn ov lítið granskaðir og harafturat dýrir. Viðvíkjandi vindinum eru vansar, tá tað er stilli ella ov nógvur vindur. Men á hesum øki er nýggj tøkni komin fram, og hana eiga vit at kanna og royna og ikki blankt at vísa frá okkum.

At byggja út vatnorkuna í Føroyum ber til. Men slíkar útbyggingar mugu vera í samljóð við ein yvirordnaðan umhvørvispolitikk. Hesin eigur m.a. at miðja ímóti ikki at gera fleiri størri inntriv í viðbreknu náttúru okkara. Vit kenna enn ikki avleiðingarnar frá tí endaligu útbyggingini í Eysturoynni. Hevur útbyggingin havt nakrar avleiðingar fyri firðir, hagar og náttúruna annars? Og hevur SEV gjørt tað, sum yvirfriðingarnevndin kravdi?

At seta upp útvið 40 vindmylnur ljóðar kanska nógv. Men vit eiga av álvara at viðgera møguleikan at seta upp fleiri vindmylnur og royna vindorku sum eina alternativa orkukeldu. Vit eiga ikki at burturvísa tankan, sum onkur hevur hug til. Eisini eigur SEV at lata meiri upp, so almenningurin, sum eigur SEV og er noyddur at keypa alla el-orku frá SEV, fær meira at vita um nýggju ætlanirnar hjá kommunala el-felagnum.

Harafturat eiga so almennu Føroyar – tað veri seg landsstýrið, kommunur og ikki minst politisku flokkarnir – at koma við í hetta orðaskifti, so vit ikki enda í somu fastlæstu støðu sum í 1984. Vónandi verða allir hesir spurningar viðgjørdir í aðalorðaskiftinum á tingi um umhvørvismál, sum skuldi byrja í gjár. Gott í tykkum í Føroya Umhvørvis- og Náttúruverndarfelag, at tit taka stig til eina umhvørvis- og orkuráðstevnu í næstum. Hóast menn kunnu verða ósamdir, so er orðaskiftið tað mest týdningarmikla fyri framtíðar menningina.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Valagn til pensionistar

Tummas Eli Høj Joensen

Landstýrið hevur nú brúkt 3,75 ár til at finna útav, at okkara pensionistar hava brúk fyri einum bata. Í alla hesa tíð hava samgonguflokkarnir felt eitt ótal av andstøðuuppskotum í løgtinginum, sum høvdu til endamáls at bøta um korini hjá teimum gomlu. – Men nú er val í hondum...

Ein fíggjarlóg bleiv samtykt fyri fáum vikum síðani, sum skuldi eitast fyri at hava eitt lítið yvirskot. Andstøðan á tingi, kanska serliga Sambandsflokkurin, hevur ferð eftir ferð víst á, at hetta fór at geva undirskot beinanvegin, tí sera nógvar eykajáttanir hava verið á hvørjum ári, meðan hetta landsstýrið hevur sitið.

Fíggjarlógin helt í eina viku

Longu tann 8. januar boðaði landsstýrið frá tí fyrsta uppskotinum, sum krevur meiri pening av fíggjarlóginni. Hvar er nú yvirskotið farið? Ein kundi freistast til at nevnt, at teir júst hava sagt nei takk til knappar 400 mil. kr. Sikkurt høvdu tær fløva í landskassanum nú !!!!

Kommunukassarnir skulu eisini gjalda ein fittan part av pensjónsuppskotinum. Tað eru ikki nógvar vikur síðani landsstýrið skuldi hava fíggjarætlanirnar frá kommununum. Hví fingu kommunurnar ikki at vita tá, at tær skuldu seta pening av til pensjónsuppskotið?

Nú løgtingsfíggjarlógin skuldi samtykkjast, fekst ikki meiriluti fyri einum uppskoti, um at geva meiri til okkara gomlu. Eg læs nú ein dagin eina grein hjá einum pensionisti, har hesin eftirlýsti einum lista við nøvnunum á teimum løgtingsmonnum, ið stemmaðu ímóti hesum uppskoti. Hann brúkti sum grundgeving fyri at fáa hendan lista, at um nú allir pensionistanir ikki stemmaðu fyri hesum monnunum, ja, so komu teir ikki inn á ting við næsta val. Hetta hevur kanska fingið tingmenn at hugsa seg um, enn eina ferð og tað alvorligani.(Tí hvør vil ikki vera afturvaldur?)

Ein kann undrast yvir, hví hettar uppskot ikki kom fyri einari tíð síðani soleiðis, at hetta kundi verið við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2002. Eitt er vist, tað hevur í bløðunum ikki skorta uppá skriving um, at okkara gomlu hava fingið ov lítið í teirra part. Eg veit líka, men er tað greinin, sum pensionisturin skrivaði, ið hevur sannført teir um, at her má nakað gerðast, annars vera vit ikki valdir aftur, so var bara væl skrivað.

Tað er eisini hugvekjandi, at hetta uppskot, tá tað kemur í gildið eftir tær drúgvu viðgerðir øll mál nú skulu hava, verður helst samtykt í mars. Sostatt kunnu pensionistanir í apríl fáa, ein kekk við afturvirkandi kraft til 1. januar og skuldi hetta givið umleið 1600 kr til hvønn. Tá eru einir 14 dagar eftir til valdagin ! Hetta kann tí ikki metast sum annað enn væl gjøgnumhugsa valagn.

Eg fari tó at vóna, at okkara gomlu fara at minnast eins og tann amerikanski veljarin gjørdi tað, tá í Bush eldri stillaði uppaftur. Hann hevði jú lova fyrru ferðina hann stillaði upp, at skattahækkingar komu ikki uppá tal. Tað tók tó ikki langa tíð, fyrr enn skattahækkingarnar komu ! Veljarin straffaði Bush fyri hetta og tí tapti hann valgið æðru ferð. Vit mugu bara vóna, at okkara pensionistar ikki gloyma, hvussu nógv teir hava verið forsømdir hetta valskeiðið, fyri síðan at vera nýttir til valagn, 14 dagar undan at krossurin skal setast.

Allir batar bøta og fari eg tí at fegnast um, at okkara pensionistar fáa eina støtti pension. Bert spell, at hetta skuldi misbrúkast til valagn.

Høvdið á blokkin

Heðin Mortensen,
løgtingsmaður

Løgmaður og varaløgmaður eru ikki so væl longur. Men eitt eru teir samdir um. Teir vilja leggja høvdið á blokkin. Títt høvd! Hóast vit ikki gerast petti meiri sjálvbjargin ella sjálvstøðug, so hava teir lækka blokkin uttan at spyrja føroyingar eftir.

Hvønn rætt eiga føroyingar til blokkin?

Tá ið vit nú – av meiri og minni góðum huga – hava góðtikið at vera í einum samveldi, er tað við ávísum treytum og ávísum rættindum.

Millum treytirnar er, at vit skulu góðtaka verjupolitikkin hjá ríkinum, og at tað er ríkið, sum eigur fullveldi. Tað merkir, at ríkið umboðar okkum í ST og ríkið tekur støðu í verjumálum.

Millum rættindini er, at tað verður javnað út millum ríkispartarnar.

Fyri hálvt hundrað árum síðani vóru varðagøtur og mjólkabátar samferðslukervi. Tá arbeiddu tey flestu til tey doyðu ella vóru forsyrgd inni hjá skyldfólki. Í dag hava vit bussar og undirsjóvartunnlar, ellisheim og fólkapensjón.

Partvís er hetta takka verið, at vit hava havt eina útjavnan ímillum ríkispartarnar. Partvís eisini hinar fyrimunirnar av ríkinum, gjaldoyra, útbúgvingar, osfr.

Hvør hevur havt størsta fyrimunin? Eg veit ikki – hvør hevur størri fyrimun, tann eldri, sum fær pensjónina, ella tann yngri, sum letur hana? – Báðir partar!

Blokkurin er ein rættur, sum vit eiga so leingi vit brúka okkara sjálvsavgerðaræstt at vera í ríkinum. Sjálvandi er støddin ein samráðingarspurningur, men Høgni og Anfinn skulu halda fingrar – og okkara høvd – frá blokkinum, um teir ikki tora at melda seg úr ríkinum.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppsetting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Svar til Regin Hammer, oljubúskaparfrøðing

Heðin Samuelsen

Tú hevur ikki lisið bræv mítt nóg gjølliga, tá tú heldur, at broytingar skulu gerast í treytunum fyri 1. útbjóðingar- umfar. Hetta umfar er farið afturum og eiga sjálvandi allar gjørdar treytir har at verða hildnar.

Tað sum eg legði upp til var: hvat gera vit, um eitt nýtt útbjóðingar- umfar kemur fyri? Skulu vit royna at fáa frægari burturúr enn útlit eru fyri í 1. útbjóðing? Ella skulu vit lata oljuna liggja í friði til komandi ættarlið?

Føroyska marginalskattin á oljuframleiðslu sigur tú verða 57%. Jú hetta ljóðar av nógvum. Og eg meini heldur ikki, at vit kunnu seta beinleiðis skattin nógv meira upp. Men tað sum eg vísti á í fyrru grein míni var roknistykkið hjá Kára Petersen, búskaparfrøðingi, sum tú sjálvur sigur teg hava eftirroknað. Har lá eftir av einum brutto ráoljuprísi uppá 21$ uppá fatið 3,50 $ (17% av brutto) til landskassan. Hinir 17,50 $ (ella 83%) eru til útbygging og rakstur av einum oljuøki og til oljufeløgini. Tað var av hesum eg helt tað kundi verði áhugavert at fingið nakrar dollarar aftrat sum avleitt virksemi. Skattin fáa vit kanska sum nevnt illa sett longur upp og tí var mítt boð, at skaffa okkum hetta fígjøgnum eitt egið oljufelag.

Tað, at hava eitt "borið" alment oljufelag, sært tú sum ein eykaskatt. Eg eri ikki vísur í, at oljufeløgini síggja hetta júst soleiðis. Latin er nógvur peningur til eitt nú lestrarstuðul í útlondum, og ung fólk eru bjóðað útbúgving innan oljufeløgini. Fleiri almennir útbúgvingarstovnar her heima eru eisini stuðlaðir við peningaískotum. Boðskapurin hevur verði, at hetta er fyri at gera okkum føroyingar meiri førleikaførar fyri, at taka ímóti teimum avbjóðingum, sum nú ein nýggj vinna sum oljuvinnan ber við sær.

Eg trúgvi ikki, at feløgini hava uppfata hetta sum ein eykaskatt. Neyvan mugu tey heldur hava meint hetta, sum ein útbúgvingarstyrk til ungar føroyingar, mest ætlað at taka arbeiði upp hjá fremmandum feløgum í Føroyum.

Nei tvørturímóti haldi eg, at hetta sum Regin Hammer kallar eyka- skatt, av mongum nýtímans oljufeløgum verður uppfatað sum "hjálp til sjálvhjálp" og lønt aftur í einum styrktum handils- samskifti ímillum Oljumálastýrið og tey ávísu oljufeløgini. Okkara privatu feløg eru so fáment, at tey hava ongan møguleika at fóta sær í braði í einari møguligari føroyskari oljuvinnu.

Tí er ein møguleikin – og kanska tann einasti – at Oljumálastýrið roynir at samráða seg til eina skipan, sum ber tað við sær at Føroyar – og tað má so verða við hjálp frá oljufeløgunum – smátt um smátt kunnu verða við í størri mun í hesu vinnu, so hetta eina eina eyka beinið í okkara vinnustrukturi ikki verður so hjólbeint, at tað trillar undan okkum.

Orð sum" at brandskatta" og "oljubygningar í Havn" er lítið vert at gera viðmerkingar til. Hetta hevur hvørki verði í mínum huga ella nevnt í mínum skrivi.

Hatta var betur ógjørt, Høgni!

Trygvi F. Guttesen

Høgni Hoydal gerst alsamt meira einsamallur í sínum flokki. Heini O. Heinesen skilti allan boðskapin hjá Anders Fogh Rasmussen, meðan Høgni bleiv hamskiftur og gloymdi alt tos um loysing og fullveldi og hevur nú trupulleikar við at finna slóðina aftur.

Øll liva vit sum børn av teim hugsanum og gerðum, sum hann og hansara líkar standa fyri í dag?

Í Dimmalætting í dag er Høgni so beisur, at hann í ørviti rótar í sínum amboðskassa og heldur seg hava funnið prógv fyri, at allir føroyingar, sum manna andstøðuflokkarnar, eru ikki líka góðir við okkara mál og merki sum hann er. Er maðurin vorðin í ørviti? Hvar finnur tú í dag ein føroying, sum ikki er bæði errin og glaður fyri okkara góða mál og merki? Hvussu ber tað til at tann áður so hampuligi og dámligi Høgni er vorðin so óndur við sínar landsmenn?

Eg skilji væl at Høgni kennir seg sera kroystan júst nú. Álvarats Høgni, átti tú ikki at verið tann allar seinasti, sum fór at skriva um smábarnarópini »Eg sigi tað við babba«? Er myrkaspælið hjá babba longu gloymt?

Høgni Hoydal skrivar eisini m.a. soleiðis: Sambandsflokkarnir í Føroyum byggja allan sín politikk á, at danskir politikarar skulu hjálpa teimum at harta sjálvstýrisflokkarnar og lova sambandsflokkunum pengar at keypa sær vinir fyri.

Lat meg gera tríggjar viðmerkingar til hesa sera grovu og ósonnu skuldseting hjá Høgna:

1. Heldur enn at brúka Heimastýrisskipanina so sum ætlað, hevur Tjóðveldisflokkurin og aðrir loysingarflokkar hækkað refusións- og blokkveitingina í 54 ár. Og heldur enn at gera heilar yvirtøkur hevur Tjóðveldisflokkurin saman við øðrum loysingarflokkum kravt av dønum, at fáa hálvar yvirtøkur, soleiðis at danir máttu gjalda meðan føroyingar skuldu valda. Sostatt er tað ikki Sambandsflokkurin, men hinvegin loysingarflokkarnir, sum hava kraddast sær pengar at keypa sær vinir og vald fyri.
2. Einasti veruligi sjálvstýrisflokkur í Føroyum í dag er Sambandsflokkurin. Sambandsflokkurin kann við sínum nýskipanaruppskoti geva Føroyum og føroyingum nógv størri sjálvstýri og sjálvráði enn loysingin fer at geva, og okkara uppskot fer eisini at geva tí einstaka føroyingi nógv størri persónligt frælsi enn loysingin nakrantíð kann geva. Um Javnaðarflokkurin megnar at halda fast við sína útmelding um eisini at vera ein samríkisflokkur, so vil hansara politikkur røkka líka langt sum okkara. Hesir báðir flokkar, kanska saman við Fólkaflokkinum, kunnu soleiðis geva okkum føroyingum eina trygga og frælsa tjóð. Góði Høgni! Títt áhaldandi meyl um loysing, fullveldi, danskar hóttanir, keypa vinir fyri pengar, knarrið um ófrælsi og hin afturvendandi suffanin um atkvøðuna í 1946, sum hvørki tú ella eg kunnu broyta, er ov mødandi og gevur einki úrslit. Nú hevur tú mjarrað og knarrað í skjótt 4 ár. Nær ætlar tú at byrja uppá tað, sum savnar og byggir upp?
3. Eingin føroyingur hevur og kemur nakrantíð at biðja danir um so nógvar pengar, sum Høgni Hoydal hevur gjørt. Hann traðkaði sínar fyrstu politisku barnaskógvar við at seta dønum krøv um loysing, fullveldi og óavmarkað vald. Næsta kravið var, at danir í eini skiftistíð skuldu leggja milliardir í hansara lumma í 15 ár. Hesi bonsku krøv Høgnasar gjørdu at Nyrup, Fogh og allir limir í Fólkatinginum gjørdust samdir um at geva Høgna eitt greitt svar. Vilja føroyingar hava loysing og fullveldi, ja, so fáa tit tað, men allar yvirtøkur í einum taki kosta pengar, og vilja tit rinda kostnaðin? Nei, tað vildi Høgni ikki, og tískil gjørdist alt ein ellubiti. Høgni skilti ikki hví hann ikki kundi fáa alt valdið uttan at gjalda. Og nú byrjaði Høgni við sínum smábarnarópum: Eg sigi tað við babba, og tað

Landssjúkrahúsið og bygnaðurin

A. Guttormur Djurhuus



Tveir yvirlæknar hava nýliga skrivað skilagott um vánaligu støðuna á Landssjúkrahúsinum. Annar kanska heldur óheppin í orðavali, men væl er skiljandi at okkurt illsinnisglepsið gleppur av munni undir slíkum umstøðum. Hin við sakligum og væl undirbygdum grundgevingum. Ein sjúkrasystur, umframt tær dulnevndu í Sosialinum, hevur eisini latið sína rødd hoyrt. Henni hevði tænt betur at tagt. Ósmæðin og sjálvglað. Eg rodnaði hennara vegna.

Vert er í hesum sambandi at bíta merki í, at Sosialurin alment sigur seg einki at vilja hava við dulnevnd lesarabrøv at gera. Her er so trongdin til at birta uppundir klandur sterkari enn almennu prinsippini.

Helst stingur trupulleikin á Landssjúkrahúsinum djúpari enn bert til nakrar normeringar. Trupulleikin er helst meira tengdur at raðfestingini á sjúkrahúsøkinum enn at fíggjarorkuni. Og raðfestingin hevur meira við leiðslubygnað at gera enn við fíggjarorku.

Tá Edmund Joensen sat sum løgmaður í Tinganesi, varð sent boð eftir manni úr Danmark at umskipa bygnaðin av almennu umsitingini í Føroyum. Hesin maður, Finn Norman Christensen, var so dugnaligur, at hann fekk føroyskar myndugleikar, uttan spurnartekin, at seta í verk eina bygnaðarskipan, sum hann helt vera góða og hóskiliga fyri Føroyar. Helst meinti hann tað, men úrslitið er at vit eru við at umsita okkum út á bláman. Jóannes Eidesgaard, tann gløggi maður hann er, royndi at smoyggja sær undan ábyrgdini og segði seg ikki at hava tikið undir við at seta skipanina í verk, men tað hava vit bæði dóm og undirskrift fyri at hann hevur. At hann hevur sovið í tímunum hjá Finni Norman Christensen er so hansara egna vanæriliga skomm.

Tá umsitingin av sjúkrahúsverkinum, við landsstýrismanninum í heilsumálum á odda, inntók bygning á sjúkrahúsøkinum til umsiting, stóð ikki á at fáa pening bæði til neyðugar og óneyðugar ábøtur og umbyggingar. Stórar upphæddir vórðu brúktar til at bøta um arbeiðsumstøðurnar hjá frískum fólki, meðan tey sjúku, niðan fyri vegin, máttu verða liggjandi í gjøstri og regni, tí ikki er ráð at skifta vindeygu.

Jákup Petersen, yvirlækni, skrivar um læknaskrivararnar á skurðdeildini, at teir arbeiða undir sera trongligum umstøðum og at hølini eru fongd við soppi, sum er heilsuskaðiligt. Hvar er fakfelagið, Starvsmannafelagið, sum letur sínar limir arbeiða undir slíkum umstøðum? Hvar er Arbeiðseftirlitið, sum hevur skyldu til at ansa eftir at arbeiðsumhvørvið er trygt? Og leiðslan á sjúkrahúsinum, hvar er hon? Veit hon ikki at tað er revsivert at lata starvsfólk arbeiða undir heilsuskaðiligum umstøðum?

Myndugleikarnir hava sett í verk eina trístreingjaða leiðslu fyri Landssjúkrahúsið. Trístreingjað leiðsla hevur verið roynd fyrr, men í ongum førum hevur hon, mær kunnugt, riggað. Men hví skulu vit ikki fáa at riggað tað sum aðrir hava kolldømt? Vit eru jú so dugnaligir at semjast um at draga somu línu?

Áhugavert hevði verið at fingið at vita, hvussu stór upphædd av játtanini til Landssjúkrahúsið,ið fór til umsiting, tá ið Bonnevie ráddi fyri borgum, og hvussu stór upphæddin er í dag.

At núverandi umsiting, sum er ónýtilig, varð skipað undir øðrum landsstýri, fritekur als ikki sitandi fyri at ikki at hava roynt at gera hana bíligari og einfaldari. Tvørturímóti hevur sitandi landsstýri útbygt og útbyggir framvegis umsitingina eftir leisti frá Finni Norman Christensen. Um hetta verður leiðin framá, liggur loysingin langt úti í framtíðini. Um nakrantíð. Væl arbeitt, Edmund!